# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# VB eltir Neistan

**Fer tað at eydnast VB at halda tætt og vinna móti Neistanum, ella skal Neistin draga frá og leggja seg longur á odda, hetta er stóri spurningurin, og svar fæst um vikuskiftið, tá enn eitt umfar av hondbólti á hægsta støði fer av bakkastokki**



*Dysturin um annað plássið er harður, og eitt týðandi slag í hesum verður um vikuskiftið, tá Neistin tekur móti VB*

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Neistakvinnurnar, ið liggja á øðrum plássi í Sunset-kappingini, taptu heldur óvæntað móti Kyndli, síðsta vikuskifti, og skulu tær tí royna at menna seg og standa ímóti, tá VB-kvinnur koma á vitjan.

Spurningurin hesaferð er, um Neistin veruliga kunnu skræða seg leysar av VB og hinum, ella um VB hinvegin klárar at halda lív í vónini um at gullkampurin skal vera millum útjaðaraliðini VB og Stjørnuna.

Hjá VB verður tað vónað at Daiva Toumaite, enn einaferð kann vísa hvør dugur er í henni. Hon hevur verið ein sannur fongur hjá VB, og ferð eftir ferð hevur hon prógvað tað. Seinasta dyst varð hon mansvard nærum allan dystin og megnaði hóast hetta at bombardera 14 mál ígjøgnum, og tað sigur ikki heilt so lítið um sterku litavisku kvinnuna.

### Spenningur í hjá monnunum

Neistin hevur ein á pappírinum, lættari dyst enn hitt oddaliðið StÍF, men sum øllum kunnugt er tað ikki á pappírinum, at dystirnar verða avgjørdir.

Neistin taka ímóti einari særdari KÍF bjørn, og vinna teir hendan dystin, samstundis sum at VÍF knúgvar StÍF, kunnu Neistamenn draga frá og økja um spenningin í kappingini um annað plássið, har H71 og VÍF liggja og lúra, klár at taka av, um nakað av hinum liðunum byrja at fara av kós.

Spurningurin er so, hvar Kyndil flýtur hesaferð. Higartil hava teir ikki havt bestu gongdina at vísa á, og hava tapt fýra dystir á rað. Hesa ferð er mótstøðan H71, ið gjarna ynskja at blanda seg meira uppí stríðið um heiðursmerkini. Hinvegin er tað púra vist, at teir grønu úr Havn fara at kempa sum úlvur á skóg fyri at rætta uppá keðiliga gongdina, og fyri at vísa, at teir eru eitt lið, ið kann spæla hondbólt á hægsta støði.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 8.12 | 14:30 | Neistin-VB |
| 9.12 | 14:30 | VÍF-StÍF |
| 9.12 | 14:30 | Kyndil-Stjørnan |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 8.12 | 16:00 | Neistin-KÍF |
| 9.12 | 16:00 | VÍF-StÍF |
| 9.12 | 16:00 | Kyndil-H71 |

### Flogbóltur

**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 8.12 | 14:00 | Dráttur-SÍ |
| 8.12 | 14:00 | ÍF-Mjølnir |
| 9.12 | 15:00 | TB-Fleyr |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 7.12 | 18.45 | Mjølnir-SÍ |
| 8.12 | 16:00 | Fleyr-ÍF |
| 9.12 | 16:00 | Fram-ÍF |

# KÍ gjørt avtalur við ungar spælarar

**KÍ hevur gjørt avtalur við fimm ungar spælarar, sum skulu verða partur av Formulahópinum hjá felagnum næstu tvey árini**

FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

KÍ hevur gjørt avtalur við fimm unglingaspælarar, sum skulu verða partur av Formulahópinum hjá felagnum. Spælararnir hava allir spælt á ungdómslandsliðum hjá FSF, og avtalurnar við spælararnir eru galdandi fram til 2009.

Spælararnir, sum hava skrivað undir avtalur við KÍ, eru John Hammer (18), Álvur Christiansen (18), Ári Samson (18), Jógvan Isaksen (17) og Dánial Pauli Lervig (16). John Hammer hevur longu spælt regluliga á besta KÍ-liðnum, og Álvur Christiansen hevur eisini fingið debut á besta liðnum. Hinir tríggir hava fyrsta dystin til góðar, men KÍ væntar sær nógv av hesum spælarum í framtíðini.

– Samstundis sum vit hava fingið nakrar profilar til felagið, sum kunnu styrkja Formulaliðið her og nú, so vilja vit eisini arbeiða langsiktað og skapa eina spennandi og vónandi gylta framtíð hjá KÍ, sigur Aksel Johannesen, nevndarformaður í Sp/f KÍ.

– KÍ hevur gjørt eitt gott ungdómsarbeiði seinnu árini, og tí eru vit í tí hepnu støðu, at vit hava nógvar ungar og evnaríkar spælarar at taka av. Nú hava vit gjørt avtalur við hesar fimm unglingarnar, men tað eru eisini fleiri aðrir ungir spælarar í felagnum, sum kunnu koma upp á tal til 1. liðshópin næstu árini, sigur hann.



*Við at knýta yngru spælararnar at sáttmálum undirstrikar KÍ langsiktaðu ætlanir felagsins*